Listafólkasamband Føroya
Pæsastova
Postbox 324
FO 110 Tórshavn
lisa@lisa.fo
www.lisa.fo
Tel +298310197

| | |
|---|---|
| Til limafeløgini | Dato: 27. maj 2009 |
| | J.nr. 2006-089 |

Mentanargrunnur Landsins

Í vár fingu vit fráboðanir um at Mentanargrunnur Landsins ikki stuðlaði mentanarligum tiltøkum uttanlands. Tann 17. mars sendu vit tí grunninum soljóðandi skriv:

> **Viðvíkjandi stuðling av mentanarligum tiltøkum uttanlands**
>
> LISA hevur fingið avrit av brøvum frá umsøkjarum, har talan er um at fáa stuðul til tiltøk uttanlands. Grundgevingin fyri at nokta er millum annað hendan: *Nevndin metir, at studningur fyrst og fremst skal verða veittur til mentanarligt virksemi, sum fer fram í Føroyum.*
>
> LISA heldur at hetta er ein rættuliga óheppin orðing, tá hetta virkar sum ein generel regla. Um grunnurin ikki ætlar at stuðla tiltøkum uttanlands, eigur hetta at vera kunngjørt, so fólk ikki brúka tíð uppá at søkja. Vit rokna ikki við at grunnurin er hildin uppat at stuðla tiltøkum uttanlands og heita tí á grunnin um at sleppa hesi orðingini.
>
> Tá ein umsókn ikki er gingin á møti, eigur ein møgulig grundgeving at vísa til viðurskifti í umsóknini og ikki til eina generella reglu, sum ikki er kunngjørd.

Tann 18. maj hevur Mentanargrunnur Landsins svara okkum:

> Vísandi til skriv tygara, dagfest 17. mars 2009, skal Mentanargrunnurin gera vart við, at grunnurin heldur seg til tær grundgevingar, ið tygum sipa til í omanfyrinevnda skrivi.
>
> Grunnurin hevur ikki tikið avgerð um ikki at stuðla tiltøkum uttanlands.

Sostatt hevur Mentanargrunnurin ikki tikið nakra generella avgerð um ikki at stuðla tiltøkum uttanlands.

Jens M. Dalsgaard, skr.